## Grønland risastóra íløgu

Í Grønlandi miðjar heimastýrið eftir at fáa ein partaeigarasáttmála við fyritøkuna Alcoa, sum skal byggja eitt stórt aluminiumsvirki í Manitsoq. Fyritøkan hevur mett, at íløgan í nýggja virkið verður millum 18 og 23 mia. krónur. Tað er umleið tvær ferðir so nógv sum tann árliga grønlendska bruttotjóðarframleiðslan. Ætlanin er, at Alcoa og heimastýrið skulu stovna eitt felag, sum skal hava fimm mia. krónur í eginpeningi. Av hesum skal heimastýrið rinda helmingin, og pengarnar ætlar landsstýrið at læna uttanlands, sigur KNR.

*Alcoa skal byggja stórt aluminiumsvirki í Manitsoq (Mynd: KNR)*

# hevur týdning

ein arbeiðir sum fiskaansari.

Teir gera vatnroyndir, taka deyðan fisk upp úr kørunum, koyra fóður í fóðurautomatirnar og reinsa kørini um tað er neyðugt, bara fyri at nevna nakað av tí, sum teir takast við í tí dagliga.

- Ja, vit skulu stutt sagt hyggja eftir, at alt er í lagi, staðfestir Páll.

Onkutíð kann eitt sindur meiri vera at gera, til dømis tá eitt filtur er farið og skal skiftast, ella um ein av mongu motorunum hevur koyrt fyri seg og skal skiftast.

### Gott við arbeiðsplássum

Fyri kalsoyingar hevði tað stóran týdning, at eitt veruligt vinnuligt arbeiðspláss fekst aftur í oynna.

Í oynni eru ymisk arbeiðspláss, til dømis innan landbúnað, umframt tænastuvinnur og almenn arbeiðspláss.

Men tað hevur eisini sín týdning fyri fólk og kommununa, at henda alistøðin júst liggur í sunnari helvt á Kalsoynni.

Og tað fegnast Páll á Bakka sum vera man eisini um:

- Jú, eg haldi, at tað er gott at fólk úr oynni kunnu arbeiða har. Tað er gott fyri kommununa, og tað heldur eisini fólkinum í bygdini.

- Var hetta arbeiðsplássið ikki, so høvdu vit helst verið onkra aðrastaðni í arbeiði, sigur hann fast.

> *Eg haldi, at vit á ein hátt eru meiri motiverað at prógva, at tað veruliga ber til at hava eina slíka støð her á oynni*
>
> *(Sylvan Rasmussen, raktrarleiðari)*

> *Tað er gott at ein kann arbeiða á einum og sama staði og so nær við heimbygdina. So sleppur ein undan at sleingjast runt til tey ymisku arbeiðini*
>
> *(Páll Sørensen, fiskaansari)*



*Eyðun og allir hinir hava lagnuna hjá í milliónatali av smoltum í sínum hondum*



*Eyðun Eliasen og Páll hava drúgvar royndir í arbeiðinum á smoltstøðini*

# Fyrimunir at vera á útoyggj

**Smoltstøðin í Knúsdali tók fyrstu ferð ímóti smolti í apríl 1999. Rakstrarleiðarin, Sylvan Rasmussen hevur verið her øll árini, eisini nú ið tað er undir Bakkafrost á Glyvrum**

**SMOLT**
*Snorri Brend*

**Á støðini eru íalt 12 kør, og í fjør framleiddu tey 1,8 mió smolt. Okkurt árið hava tey tó verið uppi á 2,0 mió smoltum.**

**Smoltstøðin letur smolt til alibrúkini hjá Faroesmolt kring oyggjarnar, ikki minst til teir mongu ringarnar sum eru á firðunum í Norðoyggjum.**

**Nakað undan jólum fór ein rúgva av smolti til alibrúkið sunnanfyri byrgingina í Hvannasundi, og nú teir aftur í mars og apríl fara at koyra smolt út verður tað latið til norðara part av Hvannasundi.**

**At smoltstøðin liggur á eini útoyggj, har vegasamband ikki er við meginøkið, hevur bæði fyrimunir og vansar við sær.**

**Sylvan heldur tó, at fyrimunirnir eru munandi fleiri enn vansarnir, hóast ein er bundin av ferðaætlanini hjá strandfaraskipinum Sam.**

**- Eg haldi, at vit á ein hátt eru meiri motiverað at prógva, at tað veruliga ber til at hava eina slíka støð her á oynni, slær hann fast.**

**Umframt hesa støðina í Knúsdali er hann eisini rakstrarleiðari á smoltstøðini á Norðtoftum.**



*- Vit hava okkurt árið framleitt 2 mió smolt. - Tað eru fleiri fyrimunir at hava eina smoltstøð í útoyggj, sigur Sylvan Rasmussen, rakstrarleiðari á smoltstøðini í Knúsdali*